Fylgiskjal 15

LM-016/2023

AMNESTY INTERNATIONAL FØROYAR
TÓRSHAVN 17.07.2023

UMMÆLI
UPPSKOT UM BROYTING Í REVSILÓGINI (ALMENNUR PARTUR)

Amnesty International Føroyar vil nýta høvið at takka fyri, at vit vórðu boðin á fund á Løgmálaráðnum um uppskotið til lógarbroytingarnar í almenna partinum av revsilógini, og somuleiðis fyri høvið at viðmerkja lógaruppskotið.

Amnesty International byrjaði sum rørsla, tá fólk kring allan heim byrjaðu at mótmæla, at tveir portugiskir ungdómar av órøttum vóru fongslaðir. Síðani hava vit arbeitt við fongsulsviðurskiftum úti í heimi og heima í Føroyum. Eisini á revsirættarliga økinum skulu mannarættindi og íborna virði menniskjans virðast, og inntrivið í hesi rættindini avmarkast í størstan mun og gerast við einum greiniligum endamáli. Á bestan hátt skal rætta javnvágin finnast í at revsa ávísar gerningar og gerningsfólk, at virða rættindi hjá órættaða og seka umframt at verja trygdina hjá borgarunum. Hetta eigur at verða gjørt út frá teirri vitan, ið vit hava um revsing og um fyribyrging av ólógligari atferð og afturfalli.

Amnesty Føroyar tekur undir við, at stig verða tikin fyri at økja um samfelagstænastu fyri at minka um fongsulsrevsing umframt at revsing skal ásetast í samband við treytaðar dómar. Í hesum ummæli viðmerkja vit yvirskipað partar av lógaruppskotinum. Vit taka útgangsstøði í sáttmálum, reglum og viðmælum hjá ST, og júst í hesum førinum er tað serliga *Office on Drugs and Crime* (hereftir nevnt UNODC) og *Standard Minimum Rules for Non-custodial Measures* (hereftir nevnt Tokyo reglurnar), vit taka støði í.

MÁL, ORÐ OG UMSETING
Í viðmerkingunum til lógaruppskotið verður nevnt, at tað í umsetingini er roynt at gera málið einfalt og lógina lætta at lesa. Hetta er gleðiligt, tí landsins lógir skulu vera lættar at lesa og skilja, so øll í samfelagnum hava bestu fyritreytir at skilja lógartekstir. Í hesum sambandi er eisini týdningarmikið at hugsa um atgongd í breiðari merking, so allir bólkar í samfelagnum hava atgongd til lógirnar og at skilja tær. Hetta hevur týdning fyri rættartrygdina og fólkaræðið í samfelagnum.

Í lógaruppskotinum og viðmerkingunum verða orðini sálarsjúka og sinnissjúka nýtt (og onnur orð, ið stava frá hesum). Hóast orðini verða brúkt hvørt um annað í dagligari talu og av fakfólki, kundi verið gott at funnið fram til best hóskandi orðið. Tað er enn nógv stigmatisering knýtt at sálarsjúku, og ynskiligt er tí, at orðaval og málburður í lóggávu ikki er óhóskandi og við at stigmatisera. Hetta kundi verðið tryggjað í samráð við Felagið Føroyskir Sálarfrøðingar og Sinnisbata/MEGD.

Eins og nevnt verður í viðmerkingunum er uppskotið í størstan mun ein umseting av donsku lógini. Í Kap. 9, §68 stendur, at rætturin kann nýta fyriskipanir um persónurin er fríkendur sambært §16. Síðani verða ymiskar fyriskipanir nevndar, men vit loyva okkum at seta spurnartekin við, um vit hava

nevndu tilboðini og fyriskipanirnar í Føroyum. *Vit vilja heita á, at tað atlit altíð verða tikin til fólk við serligum tørvum og førleikum, og at neyðugu fyriskipanir verða mentar til hesar bólkar, sum tekur atlit til førleikar, møguleikar og avmarkingar.* UNODC[1] vísir í vegleiðing á, hvussu fyriskiparnir kunnu taka atlit til ávísar sárbærar bólkar (ikki einans tey, ið kunnu verða fevnd av §16 men eisini t.d. kvinnur og LGBT+ persónar).

SAMFELAGSREVSING OG AÐRAR FYRISKIPANIR

Persónliga frælsið er eitt grundleggjandi mannarættindi, og er ein grundregla í mannarættindasáttmálum. Frælsistøka er eitt stórt inntriv í persónliga frælsið, og *Amnesty Føroyar fegnast tí um, at stig verða tikin fyri at økja um samfelagstænastu og minka um frælsistøku.* Í Amnesty Føroyum halda vit, at frælsistøka eigur at vera nýtt sum minst, men er neyðug í teimum førum, har endamálið við revsingini ikki verður rokkið við aðrari revsing enn fongsulsrevsing. Er talan um fongsling, samfelagstænastu ella aðra fyriskpan skulu rættindini hjá persónunum altíð virðast, inntrivið í persónliga frælsið og onnur rættindi verða so lítil sum møguligt fyri at røkka endamálinum við revsingini. Umstøður og sømdir í samband við samfelagstænastu og aðrar fyriskipanir mugu eisini tryggjast.

Sambært Tokyo reglunum[2] skal revsing, sum ikki er fongsulsrevsing, eisini verða grundað á treytir, ið taka atlit til slag og álvarsemi av brotsgerðini umframt persónsmensku og bakgrund hjá gerningsfólkinum, orsøkina til dómin og rættindini hjá órættaða. Sjálvt um talan ikki er um fongsulsrevsing, skulu mannarættindi og menniskjasliga virðið hjá gerningsfólkinum altíð virðast.

Tá ið persónliga frælsið verður skert í slíkan mun, sum fongsling ger, krevst, at orsøkin til fongslingina er neyðug fyri at røkka einum ávísum endamáli, sum ikki kann verða rokkið við aðrari revsing, verður eisini staðfest í Tokyo reglunum. Revsing hevur ymisk endmál, og fongsulsdómur tryggjar ikki av sær sjálvum, at endamálið verður rokkið. Office on Drugs and Crime[3] hjá ST vísir á, at við rætta stuðli og hjálp, kunnu nakrir av sárbærastu bólkunum í samfelagnum fáa eitt lív uttan afturfall - og jú fyrr tað verður arbeitt við reintegratión, jú betri eru útlitini. At revsingin verður sett í verk í samfelagnum heldur enn uttan fyri samfelagið kann altso verja samfelagið í størri mun. Í lógaruppskotinum verða serliga álvarsom brotsverk nevnd, sum ikki kunnu geva samfelagstænastu ella aðra fyriskipan. Her verður m.a. nevnt rúsevnismál. Vit vilja gera vart við, at tað sambært Office of Drugs and Crime í slíkum førum kann verða meiri gagnligt fyri bæði samfelag og brotsfólk við fyriskipanum sum t.d. avvenjing og exit-fyriskipanum. *Vit fara tí at heita á, at atlit verður tikið til gransking og vitan um júst hendan bólk og lógarbrot.*

Í Tokyo reglunum[4] verður dentur lagdur á týdningin av gransking og hagtalsinnsavnan. *Amnesty Føroyar hevur áður vist á manglandi hagtøl og kanningar innan økið, og fara vit enn einaferð at vísa á hendan týdning.* Alt revsirættarliga økið má lýsast gjølla m.a. fyri at fáa innlit í viðurskifti hjá teimum, sum á ymiskan hátt verða revsaði, fyri at hava møguleika at fylgja við gongdini á økinum og fyri at tryggja, at fongsling, samfelagstænasta og aðrar fyriskipanir rigga eftir ætlan. Eisini kann leggjast afturat, at hóast vit kunnu gera okkum dælt av vitan og gransking úr øðrum londum, *er*

---

[1] https://www.unodc.org/documents/justice-and-prison-reform/crimeprevention/Handbook_of_basic_principles_and_promising_practices_on_Alternatives_to_Imprisonment.pdf?fbclid=IwAR3Ur20kgp1v6Jo-6_kzS04gvcGlaiHcg54JRurMw9sXP9R9qyQvPb0diTM

[2] https://www.ohchr.org/sites/default/files/Documents/ProfessionalInterest/tokyorules.pdf

[3] https://www.unodc.org/documents/UNODC_WHO_Alternatives_to_conviction_or_punishment_ENG.pdf

[4] https://www.ohchr.org/sites/default/files/Documents/ProfessionalInterest/tokyorules.pdf

LM-016/2023

tørvur á at lýsa føroysku viðurskiftini gjølla, tí m.a. støddd, virðir og siðvenjur kunnu spæla stóran leiklut.

FØROYSK REVSILÓG

UNODC[5] vísir á, at stórar broytingar eru farnar fram á økinum seinastu árini. Frá at einans síggja revsing sum frælsistøku av ymiskum slagi, verður restorativt rættvísi og reintegratión ein alsamt størri raðfesting. Í UNODC verður mælt til nýhugsan innan alla revisrættarligu skipanina, og eitt atlit til mannarættindi er ein av orsøkunum til tað.

Í Amnesty Føroyum fegnast vit um, at mælt verður til at smíða eina føroyska revsilóg, sum í størri mun kann taka atlit til føroyska samfelagið og samfelagsviðurskiftini. Umframt at taka hesi atlitini, *fara vit at heita á at tryggja, at grundarlagið undir øllum revisrættarliga økinum byggir á mannarættindi,* og á eina vitan á økinum t.d. um fyribyrging av lógarbroti og afturfalli umframt at tryggja bestu reintegratiónina av teimum, sum sita dóm (av ymiskum slagi). Her fara vit aftur at nevna týdningin av, at hagtalsinnsavnan og kanningar verða settar í verk, so ein nýggj lóg kann byggja á vitan um føroysk viðurskifti. *Vit fara eisini at heita á, at tað í arbeiðinum at smíða eina nýggja revsilóg verður hugsað breitt og at allir viðkomandi stovnar verða tiknir við arbeiðið, so økið verður sæð sum ein heild og fer tvørtur um greinar og geirar.*

Amnesty International Føroyar
Tórshavn 17.07.2023

[5] https://www.unodc.org/unodc/en/justice-and-prison-reform/prison-reform-and-alternatives-to-imprisonment.html